# Wonga og rævene




Høvundur og myndprýðari: Molly Wittus (Danmark)
Jensen & Dalgaard, 2024

Tilnevnd Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2025

Søgugongd: Wonga situr og hugnar sær heima við at seyma ein regnjakka. Hon nýtur at vera einsamøll. So bankar á hurðina. Ein revur søkir lívd fyri regninum. Og so kemur ein afturat. Og ein afturat. Og aftur ein. Og soleiðis blívur tað við. Wonga má antin finna seg í tí ella finna eina loysn.

Evni: hugflog, náttúra, djór, forvitni, veður, vinalag

## Samrøða og uppgávur:

### HYGG OG LES saman við teimum yngstu

**Hygg at permuni. Hvat síggja tit? Á næstu síðu sær mann húsini hjá Wongu. Lýs tað fyri barninum. Kundu tit hugsað tykkum at búð í einum tílíkum húsi? Hvat halda tit um revarnar? Hava tit nakrantíð sæð ein rev? Hvussu halda tit, ein revur ljóðar?**

### TEY YNGRU

**1. Hyggið at permuni. Hvat halda tit, bókin snýr seg um?**

**2. Hvussu nógvir revar eru á forsíðuni? Hava tit nakrantíð sæð ein rev?**

**3. Hvussu halda tit, Wonga hevur tað, tá tað bankar á hurðina? Hava tit nakrantíð fingið vitjan av onkrum, tit ikki kenna?**

**4. Halda tit, at revarnir eru vandamiklir ella vinarligir? Hvat hevði tú gjørt, um ein revur stóð uttan fyri tína hurð? Hvussu heilsar mann uppá ein rev?**

**5. Ger eina tekning av tær sjálvum saman við einum góðum revavini. Fortel um tín revavin.**

### MIÐLINGAR

**1. Hvør er Wonga? Hvat dámar henni at gera? Hyggið at myndunum av húsinum hjá henni. Hvat hevur hon í stovuni og í køkinum?**

**2. Hyggið at myndunum av revunum á s. 17 og 18. Hvat gera teir í stovuni hjá Wongu?**

**3. Hvat hugsar Wonga, tá hon letur hurðina upp? Hvat hevði tú gjørt, um tað stóð ein fremmandur í hurðini?**

**4. Vel ein av revunum á myndini og skriva eina lýsing av revinum. Hvat dámar revinum at gera, hvar býr hann, og hvussu skuldi regnjakkin hjá revinum sæð út?**

**5. Ger tín egna rev við ymiskum litum og mynstrum úr pappíri og pappi. Tú kanst eisini seyma, mála ella gera eina kollasju við ymiskum tilfari.**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Lesið bókina í bólki og tosið saman um myndprýðingarnar. Hvussu hevði tú lýst Wongu? Hvør er hon, og hvussu hevur hon tað?**

**2. Wonga endar við at hjálpa revunum, hóast hon ikki var so fegin um at fáa vitjan av teimum í byrjanini. Hví heldur tú, hon broytir meining? Hevur tú nakrantíð broytt meining um onkran?**

**3. Skriva eina yrking um at hitta onkran, tú ikki kennir.**

**4. Wonga verður troytt av revunum. Kennir tú til at troyttast av onkrum?**

5. Hyggið at s. 19 og 20. Ímynda tær, at tú ert í einum skógi, meðan tað regnar. Hvussu luktar tað í skóginum, og hvussu kennist tað? Hvat sært tú? Hvat hoyrir tú? Eru onnur djór har, sum eisini eru farin út at ganga í regninum? Hvussu vildi tann fullkomni túrurin í skógin í regni verið fyri teg? Tosið saman um hetta.

6. Sniðgev tín egna regnjakka. Hvønn skal regnjakkin vera til? Tín sjálvs? Ella eitt djór?

---

**AÐRAR SPENNANDI BØKUR:**

Om du möter en björn eftir Malin Kivelä, Martin Glaz Serup og Linda Bondestam

O PO POI eftir Jan Oksbøl Callesen

Djur som ingen sett utom vi eftir Ulf Stark og Linda Bondestam

---

## MÁLBITIN

# "Revur"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursamiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Räv** | **Ræv** | **Rev** | **Refur** | **Revur** | **Terianniaq** | **Kettu** | **Rieban** |



**Fá íblástur til myndabøkur við at fylgja Norðurlendska bókalúkinum á Instagram: @nordiskabokslukaren**